## Nicu Dogaru til EB/-Streym



Tað verða framvegis rípur á búnanum, men tær reyðu verða skiftar um við bláar, nú EB/-Streymur og HB eru komin ásamt um, at Nico Dogaru framyvir fer at spæla fyri samansett liðið.

Nico, sum hevur verið partur av HB-miðvøllinum tey bæði meistaraárini, hevur als ikki verið við á besta HB-liðnum hetta kappingarárið.

Orsøkin til hetta er fyrst og fremst, at tað ikki hevur eydnast HB at fáa neyðugu arbeiðs- og uppihaldsloyvini, sum tað nú verður ansað so væl eftir, í rættlag.

HB var í fjør heyst eitt av feløgunum, sum varð kannað, tá úlendingamálið av álvara fór á rull, og tá var komið eftir, at onkur formligu feilur var í arbeiðsloyvinum hjá Nico.

Í HB hava tey í ár roynt at fáa hetta í rættlag, men tað hevur so ikki eydnast teimum, og á HB-heimasíðuni verður viðgerðin av málinum kallað beinleiðis ófantalig.

Sum skilst, so hevur HB enntá roynt at toygt viðgerðartíðina, við at senda Nico á eina stutta ferð til Rumenia, soleiðis at turist-visum hansara kundi endurnýggjast, men hóast longda skotbráið, so fekst arbeiðsloyvið ikki til vega.

EB/Streymur hevur síðani sýnt áhuga fyri leikaranum, og tað hevur nú eydnast teimum at fáa neyðugu loyvini í rættlag, og verður tað sostatt har, at rumenski miðvallarin fer at sýna síni kynstur hetta kappingarárið.

**-jm**

KÍ-GÍ 1-1 (0-1):

# Málini eru sum lundi á jólanátt



*Talan var um fáar upplagdar møguleikar, tá KÍ og GÍ tókust Kristi himmalferðardag*

*Mynd: SáH*

**Møguleikarnir vóru fáir, tá ið KÍ og GÍ við 1-1 gjørdust eitt sindur verri fyri á støðutalvuni, enn tey hava verið higartil**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Hóast tætta uppgerð, har møguleikarnir báðar vegir kundu teljast á fingrunum á aðrari hondini, so kann hvørgin parturin vera nøgdur við eitt stig í høgættarkuldanum í Klaksvík sunnudagin. Tað ber við sær, at vinnararnir í fjórða umfarinum styrktu um sína støðu sammett við KÍ og GÍ.

Klaksvíkingar fáa ikki nógvar opnar málmøguleikar, tí teir fokusera so nógv upp á verjupartin. Útgangsstøðan er, at teir fýra á miðvøllinum eru skipaðir sum tøtt eind í tí, sum plagar at verða nevnt diamanturin. Tað ber við sær, at miðjuspælararnir eru tættir í verjupartinum. Hugsanin er, at mótstøðumenninir ikki skulu megna at bróta ígjøgnum, og at tað skal røkka langt sjálvir at skjóta eitt mál. Í roynd at styrkja um verjupartin, hevði Ove Flindt-Bjerg hesa ferð sett Ova Nysted undir liðina á Aleksander Djordjevic í miðverjuni.

Trupulleikin hjá klaksvíkingum er, at framrættaða spælið verður ov stirvið. Miðvallararnir, sum í álopspartinum eiga at gerast rættuliga vandamiklir, tá ið teir fáa høvi at til og megna at sleppa út um og afturum verjuna, áðrenn teir leggja innfyri, koma sjáldan so mikið langt, tí teir hava so nógvar verjuskyldur at hugsa um.

Talan er um ikki ókendan trupulleika, og tað kann ivaleyst gerast soleiðis, at javnvágin verður uppaftur betur, enn hon higartil hevur verið. Men nú hevur KÍ spælt tríggjar ferðir hálvan annan tíma í landskappingini á heimavølli, og teir hava skorað fýra mál. Tvey av mótstøðuliðunum hava verið tey, sum eru niðast á støðutalvuni.

Hesa ferð høvdu heimamenninir møguleikar. Felags eyðkennið fyri teir var, at teir spurdust burturúr deyðbóltsstøðum. Fyrra partin av fyrra umfarinum noyddust bæði Súni Olsen og Hanus Jacobsen at bjarga á strikuni, eftir at Stig Aksnes hevði roynt ímóti málinum, tá ið hornaspørk vórðu send innfyri. Og tí einu ferðina hevði Ovi Nysted betri stundir eftir frísparksinnlegg, enn hann sjálvur var greiður yvir. Í skundinum hjá honum fór royndinúr góðari støðu og við síðuna av málinum hjá Halli Hansen.

### Eingin Vitus

Uppstillingarnar og útskiftingarnar seinastu ferðirnar bera boð um, at gøtumenn ikki halda FCK mannin vera álitið, sum teir skulu rokna við fer at syrgja fyri málunum. Hesa ferð var Poul Arni Jacobsen einsamallur á toppinum, meðan Popczynski var í væl kenda leiklutinum sum hálva vegna álopsspælari og hálva vegna miðvallari, og Súni Olsen var ætlaður at vera stýrimaður á miðvøllinum.

GÍ hevði ikki havt stórvegis av málmøguleikum, og tá ið rúmur hálvur tími var farin, tóktist tað heldur ikki, at nakað skuldi spyrjast burturúr framleggingini í høgra borð, sum sá út til at skula fara av vølllinum. Men tað vildi Áslakur R. Petersen, sum hevur sitið nógv á beinkinum, men sum hesa ferð hevði fingið møguleikan á miðvøllinum í høgru, ikki. Hann heilfluktaði úr eitt sindur spískum, og Jákup Mikkelsen kundi ikki gera annað enn bara at stara eftir bóltinum - ikki ólíkt tá ið beiggi Áslak, Eyðolvur í ÍF, skoraði ímóti KÍ í steypadystinum í Fuglafirði.

Málið bar við sær, at gøtumenn fingu um endan, og at tað meiri gekk fyri seg eftir teirra treytum.

Eftir steðgin royndi KÍ at spenna uppaftur meiri í. Fyrstu løtuna løgdu teir GÍ undir stórt trýst, og tá ið umfarið var átta minuttir gamalt, fingu teir málið. Eftir innlegg í GÍ brotsteigin gekk illa hjá verjuni at rudda upp. Bólturin kom til Stig Aksnes, sum um brotsteigarmarkið dró eitt vet, áðrenn hann smekkaði til eitt sindur til vinstru, og Hallur hevði kanska ilt við at fylgja við, áðrenn bólturin fór inn við nærra stólpanum.

So var javnt, og klaksvíkingar tevjaðu møguleikan fyri at vinna. Miðskeiðis í 2. hálvleiki versnaðu fyritreytirnar hjá KÍ, tí miðvallarin Símun Joensen sá reytt, eftir at hann hevði hevnt seg. Eina løtu spældi KÍ við bara Stig Aksnes frammi, men so spentu teir bogan. Erling Fles varð fluttur fram aftur í álopið, og teir høvdu bara tríggjar á miðvøllinum. Tað var tætt, og kanska hevði GÍ bóltin meiri seinna partin av seinna umfarinum. Men KÍ hevðí størstu møguleikarnar. Onkrar skotroyndir vóru úti frá, og Erling Fles var fimm minuttir undan leikloki um at gerast heilt vandamikil úr spískum í høgru, men tað komu ikki fleiri mál.

### FAKTA

**KÍ-GÍ 1-1 (0-1)**
0-1: Eyðolvur R. Petersen 32.
1-1: Stig Aksnes 53.

**Dómari:** Eiler Rasmussen
**KÍ:** Jákup Mikkelsen — Jan Andreasen, Ovi Nysted, Aleksander Djordjevic, Jákup Hansen (Marek Wierzbicki, 69.) — Arnhold Joensen (Eyðun Klakstein, 79.), Jan Joensen, Atli Danielsen, Símun Joensen — Erling Fles (Niclas Niclasen, 90.), Stig Aksnes
**Reytt kort:** Símun Joensen 65.
**GÍ:** Hallur Hansen — Hans Pauli Petersen, Poul Ennigarð, Atli Gregersen, Hanus Jacobsen — Áslakur R. Petersen (Poul Henning Jacobsen, 81.), Símun Louis Jacobsen (Høgni Madsen, 62.), Súni Olsen, Magnus Skoralíð — Krzystof Popczynski, Poul Arni Jacobsen (Vitus Kofoed, 70.)



# TB beina kós móti 1. deild

**Aldursforsetin í føroyskum fótbólti, TB, hevur sett beina kós móti 1. deild**

2. DEILD
*sportal.fo*

Á heimavøllinum á Sevmýri vann TB í dag 4-1 móti oyggjafeløgunum úr Sumba. Sigurin hjá TB var fult uppiborin, og hóast bæði liðini fingu ein mann vístan av vølli, var eingin ivi um úrslitið.

Í Havn var FS Vágar á vitjan hjá B36, og teir fóru annað umfarið á rað tómhentir av vøllinum. B36 vann nevnliga dystin 4-3, eftir at heimaliðið hevði verið á odda 2-1 í hálvleikinum. Ungi og evnaríki Heini í Skorini skeyt tvey av málunum hjá B36.

Argjamenn royna at bjóða av í kappingini um tey fremstu plássini. Í dag vann AB 2-1 á útivølli móti VB. Øll trý málini komu fyrsta korterið av dystinum. Eyðun Samuelsen legði gestirnar av Argjum á odda í 9. minutti, men tveir minuttir seinni javnaði Sigmund Mikkelsen fyri VB. AB svaraði tó skjótt aftur, tí tað gingu bert tveir minuttir, so hevði Bjarni Jørgensen lagt gestirnar á odda aftur 2-1, sum eisini gjørdist endaliga úrslitið.

Sandoyingar vunnu annað vikuskiftið á rað ein 3-2 sigur. Hesaferð vóru tað leirvíkingar, sum vóru á vitjan heima á Sandi, men teir fóru tómhentir av aftur oynni. Hálvleiksstøðan var 1-0 til B71.

Seinasti dysturin í 2. deild hetta umfarið var í Klaksvík, har KÍ hevði vitjan av Royn. Hóast klaksvíkingar fingu bestu byrjanina, so eydaðist tað ikki teimum at halda tørn. KÍ var á odda 3-1 í hálvleikinum, men Royn gjørdi bart eftir steðgin og skoraði tríggjar ferðir, so at endaliga úrslitið gjørdist 4-3 til Royn.

**Úrslitini**
TB-Sumba 4-1
B36-FS Vágar 4-3
VB-AB 1-2
B71-LÍF 3-2
KÍ-Royn 3-4

# Hollendskar stjørnur

Tað er ikki hissini nøvn, sum føroyska landsliðið skal royna seg ímóti, tá teir 1. juni fara á vøllin í Lausanne, har hollendska landsliðið er mótstøðan.

Hollendski landsliðsvenjarin, Dick Advocaat, boðaði mikudagin frá, hvørjar 23 leikarar hann hevur boðsent til EM-undankappingina, og tað er greitt, at flestu av hesum teljast í avgjørda europeisku toppklassanum. Eisini hóast tað vegna skaðar ikki bar honum til at boðsenda monnum sum Mario Melchoit og Jimmy Floyd Hasselbaink úr Chelsea, Paul Bosvelt úr Manchester Citu og Andre Ooijer úr PSV Eindhoven.

Tey 23 nøvnini eru: Málverjar: Edwin van der Sar (Fulham), Ronald Watereus (PSV), Sander Westerveld (Real Sociedad). Verjuleikarar: Michael Reiziger (Barcelona), Johnny Heitinga (Ajax), Jaap Stam (Lazio), Frank de Boer (Rangers), Giovanni van Bronckhorst (Barcelona), Wilfred Bouma (PSV). Miðvallarar: Rafael van der Vaart (Ajax), Wesley Sneijder (Ajax), Edgar Davids (Barcelona), Clerence Seedorf (Milan), Philip Cocu (Barcelona), Boudewijn Zenden (middlesbrough), Mark van Bommel (PSV. Álopsleikarar: Ruud van Nistelrooy (Man. United), Patrick Kluivert (Barcelona), Pierre van Hooijdonk (Fenerbache), Roy Makaay (B. München), Andy van der Meyde (Inter), Marc Overmars (Barcelona) og Arjen Robben (PSV).

**-jm**

# Leon úr KÍ og til ÍF

Einki tykist skula spyrjast burturúr sambandinum millum KÍ og Súna Fríða Barbá, sum mikudagin segðist vera á veg til Klaksvíkar

Tað er ikki bara høgættartrekkur í Klaksvík. Lotið tykist eisini liggja úr KÍ og til Fuglafirðar og ÍF. Undan kappinarbyrjan í ár flutti málverjin Kartin Joensen úr KÍ og til ÍF. Tíðliga í fjør flutti Rúni Elttør úr KÍ og í B36, og undan kappingarbyrjan í ár endaði eisini hann í Fuglafirði, har hann er vongverji og toppskjútti.

Nú er enn ein klaksvíkingur farin til Fuglafirðar. Sambært heimasíðuni hjá Norðlýsinum, sum ger nógv burturúr at fylgja við í tí, sum rørir seg í og kring KÍ, so hevur Leon Bjartalíð nú gjørt av at gevast at spæla fótbólt í Klaksvík. Hann ætlar sær at royna, um fótbóltsevnini kunnu geva meiri spælitíð í ÍF, enn tey hava gjørt í Klaskvík.

Leon Bjartalíð hevur í KÍ verið nógv nýttur í álopinum og eisini á vongverjanum. Har vann hann fyrr í vár plássið í høgru, sum Harley Bertholdsen og Atli Danielsen hava røkt síðstu árini. Síðani Jan Andreasen kom fyri seg eftir skaða, hevur hann vunnið vongverjaplássið, og nú tímir Leon ikki at sita so nógv á beinkinum. Spurningurin er so, um hann fer at fáa spælitíð í Fuglafirði, og um hvør so skal út á beinkin at bíða.

Fyrr í vikuni ljóðaði, at KÍ og Súni Fríði Barbá vóru um at gera samstarvssáttmála. Sambært Norðlýsinum vóru partarnir samdir, men so hálsaði álopsspælarin um. Hann segði seg ikki hava umstøður at venja í Klaksvík.

**jh**

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM



Bilpakka Summarið 2004



Bilur + 2 fólk til Danmarkar
úr 2.720,-

**Føroyar – Danmark** ella hinvegin
Tórshavn – Hanstholm ella hinvegin

| Lágárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 2.720 | 3.200 | - | - | - | 4.320 |
| Bilur + 3 fólk | 3.580 | 4.300 | - | 5.110 | 5.530 | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.440 | 5.400 | 6.080 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 5.300 | 6.500 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn. | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 3.720 | 4.160 | - | - | - | 5.800 |
| Bilur + 3 fólk | 4.780 | 5.440 | - | 6.820 | 7.420 | - |
| Bilur + 4 fólk | 5.840 | 6.720 | 7.560 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 6.900 | 8.000 | - | - | - | - |

Bilur + 2 fólk til Noregs
úr 1.960,-

**Føroyar – Noreg** ella hinvegin
Tórshavn – Bergen ella hinvegin



| Lágárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn. | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 1.960 | 2.280 | - | - | - | 2.920 |
| Bilur + 3 fólk | 2.640 | 3.120 | - | 3.600 | 3.840 | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.320 | 3.960 | 4.440 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 4.000 | 4.800 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn. | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 2.480 | 2.960 | - | - | - | 3.760 |
| Bilur + 3 fólk | 3.300 | 4.020 | - | 4.620 | 5.100 | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.120 | 5.080 | 5.720 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 4.940 | 6.140 | - | - | - | - |

Bilur + 2 fólk til Hetlands
úr 1.420,-

**Føroyar – Hetland** ella hinvegin
Tórshavn – Lerwick ella hinvegin



| Lágárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn. | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 1.420 | 1.710 | - | - | - | 2.240 |
| Bilur + 3 fólk | 1.860 | 2.295 | - | 2.715 | 2.970 | |
| Bilur + 4 fólk | 2.300 | 2.880 | 3.280 | - | - | 3.940 |
| Bilur + 5 fólk | 2.740 | 3.465 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn. | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 1.880 | 2.240 | - | - | - | 2.900 |
| Bilur + 3 fólk | 2.460 | 3.000 | - | 3.480 | 3.810 | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.040 | 3.760 | 4.160 | - | - | 5.080 |
| Bilur + 5 fólk | 3.620 | 4.520 | - | - | - | - |

Bilur + 2 fólk til Íslands
úr 2.330,-

**Føroyar – Ísland** ella hinvegin
Tórshavn – Seyðisfjörður ella hinvegin



| Lágárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn. | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 2.330 | 2.650 | - | - | - | 3.530 |
| Bilur + 3 fólk | 3.045 | 3.525 | - | 4.185 | 4.545 | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.760 | 4.400 | 4.960 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 4.475 | 5.275 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn. | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 3.080 | 3.440 | - | - | - | 4.640 |
| Bilur + 3 fólk | 4.020 | 4.560 | - | 5.460 | 5.940 | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.960 | 5.680 | 6.480 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 5.900 | 6.800 | - | - | - | - |

Prísirnir í lágárstíð eru galdandi fyri 1 persónbil (upp til 7,0 m longd og 2,5 m hædd) og valda talið av ferðandi annan vegin.
Børn yngri enn 6 ár, ið ikki hava egna koyggju, ferðast ókeypis.

Prísirnir í háárstíð eru galdandi fyri 1 persónbil (upp til 5,0 m longd og 1,9 m hædd) og valda talið av ferðandi annan vegin.
Børn yngri enn 6 ár, ið ikki hava egna koyggju, ferðast ókeypis.

SMYRIL LINE